# EB/STREYMUR STEYPAVINNARI 2010




## Tríggir nýggir leikarar í hópinum

Karl Løkin, Hendrik Rubeksen og Justinus R. Hansen eru úttiknir til dystin móti Estlandi. Nógvir leikarar hava givið avboð til dystin móti Estlandi. Týsdagin var tað Súni Olsen, og í dag hava tríggir leikarar afturat boðað frá, at teir ikki kunnu koma við. Atli Danielsen, Høgni Zachariasen og Vagnur M. Mortensen hava av ymiskum orsøkum allir verið noyddir at geva avboð. Brian Kerr, landsliðsvenjari, hevur úttikið Hendrik Rubeksen (HB), Justinus R. Hansen (NSÍ) og Karl Løkin (ÍF) ístaðin. Ongin teirra hevur roynt seg á føroyska A-landsliðnum áður.

# Spældu væl hóast tap

**Venjarin hjá ÍF,** Àbraham Løkin var stórt sæð nøgdur við leikliga avrikið hjá sínum monnum, hóast ÍF heldur ikki rakk steypasigrinum á hesum sinni. – Eg haldi, at vit fyri sovítt spæla ein góðan dyst, men vit megna ikki at avgera hann til okkara fyrimun, so eg eri sjálvsagt vónbrotin, tá saman um kemur. Spurdur um tað var rutinan, sum manglaði í teimum avgerandi løtunum, svaraði Ábraham: -. Tað kann ein kalla tað, men ein kann eisini kalla tað hepnið hjá teimum. Tá bólturin er beint uttanfyri, heldur enn beint innanfyri málið, so vinnur ein ikki nakran dyst. Tá ein fær so nógvar málmøguleikar í einum dysti, og ikki skorar, ja so tapir ein dystin. Spurdur um hvat hann helt fattaðist tað síðsta korterið, fyri at leggja eitt veruligt trýst á EB/Streym, svaraði Ábraham, at tað bar heldur ikki til at satsa óneyðuga nógv: - Eg helt, at vit høvdu nóg mikið av fólki har uppi, og nóg mikið av málmøguleikum til at avgera dystin. At blaka alt fólkið inn í brotsteigin og bara gúppa, tað hava vit roynt áður, og tað hevur ikki eydnast, so eg helt ikki, at tað var loysnin, staðfesti Ábraham Løkin.



# Rutinan gjørdi munin



**Venjarin hjá EB/Streymi,** Heðin Askham viðgekk, at teir vóru í ringum skørum stórar partar av dystinum, tá ÍF misnýtti stórar og upplagdar málmøguleikar. Men hann legði eisini herðslu á, at hann eigur eina rutineraða manning, ikki minst tí lið hansara hevði royndirnar frá 2007, 2008 og 2009 at spæla steypafinalu. – Vit hava eitt av teimum mest rutineraðu liðunum í Føroyum í løtuni, og onkursvegna megnaðu teir at koyra tað heim, tí vit vóru veruliga trýstir ímóti dystarenda, viðgekk Heðin Askham aftaná dystin. Men Heðin duldi ikki hvat liðið fer eftir nú: - Tað er einki at ivast í, at nú fara vit eftir føroyameistaraheitinum, hesin sigurin er, ið hvussu er startskotið til tað. Nú vóna vit veruliga, at tað kemur glið á. Eg eri einastandi glaður fyri henda sigurin, tí vit vóru ongantíð tryggir, og teir vóru veruliga naskir, men eg haldi kortini, at sum verjuspælarnir hjá mær eisini søgdu við meg, at teir høvdu tamarhald á støðuni.

# Nøgdir við avrikið, men ikki úrslitið

**Formaðurin í ÌF,** Ólavur Larsen var sera harmur um úrslitið, tá ÍF hóast nógvar gyltar málmøguleikar hevði tapt steypafinaluna ímóti EB/Streymi, og harvið fýra av fýra steypafinalum í søgu felagsins. – Okkara menn stríddist ótrúliga væl, og teir royndu alt tað, sum teir kundu. Eg helt eisini, at vit vóru omaná tað mesta av dystinum, og høvdu eisini teir størstu málmøguleikarnar, men so sleppa teir ígjøgnum og fáa eitt rættiliga bíligt mál. Tað skuldi verið 0-0 í steðginum, tí so høvdu vit heilt víst vunnið dystin. Tað var ótrúliga nervapirrandi at verða til hesa finaluna, tað stóð nógv á allan dystin. Okkara menn vildu vísa tenn, men tað manglaði tað síðsta, og tað var ógvuliga strævið og troyttandi at verða vitni til. Hetta er byrjanin til nakað stórt, bíða bara til endan av kappingárinum, segði ein fattur Ólavur Larsen aftaná dystin, sum ikki ivast í, at ÍF fer at fáa heiðurmerki, tá kappingin í vodafonedeildini er liðug. – Vit skulu arbeiða víðari við tí vit hava avrikað higartil, og vit skulu út í Europa.



**HS**

# Ongantíð troyttur av at vinna



**Formaðurin í EB/Streymi,** Rólant Højsted var sera stoltur, tá hann stóð við løgmanssteypinum í hondini. Felagið hjá honum hevur nú vunnið løgmanssteypið tríggjar ferðir tey seinastu fýra árini. Og løgmaður, Kaj Leo Johannesen bar eisini uppá mál, at EB/Streymur hevði vunnið 75 prosent av teimum finalunum, teir høvdu verið í, tá hann handaði teimum svørt/bláu steypið. Rólant Højsted kendi seg tó ikki vísan í, at sigurin var heima, tá seinni hálvleikur var farin í gongd. – Tað sá ikki gott út, tá seinni hálvleikur byrjaði, tá hevði ÍF líka sum leikliga yvirvág. Men tá teir so misnýttu sínar møguleikar, so byrjaði eg at kenna meg vissan í, at dysturin fór at enda 1-0 til okkum. Eg haldi tað er ófært at gerast steypavinnari, vit mugu bara vinna Føroyameistaraheitið líka ofta, staðfesti formaðurin í EB/Streymi, sum ikki duldi hvør ambisjónin hjá felagsliðnum í Sundalagnum er. Greipan og Champions League undandystir eru næsta málið.